Hósvík, tann 07. sep 2017

**Fletting 2017**

Nú heystið nærkast, og fjøllini verða gingin, er løtan komin at biða um tíð at fáa seyðin flettan á løggildum sláturvirki. Krás bjóðar sær at keypa lombini frá tykkum. Tá seyðurin er fluttur til Krás, eru tit leys av øllum arbeiðinum av seyðinum. Eisini kunnu vit fletta fyri tykkum, tá fáa tit krov, høvd og mør aftur.

Krás er løggilt sláturvirkið, og flettingin fer fram undir strongum eftirliti av djóralækna frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Eftirlitið hjá djóralækna inniber m.a., at hann sýnar tann livandi seyðin. Tá seyðurin er flettur, verða krovini kannað, áðrenn tey verða vigað og endaliga góðkend.

Eftir at tit hava avtalað við Krás, nær seyðurin skal flettast, skipa tit fyri, at seyðurin verður fluttur til okkum. Tað er umráðandi, at seyðurin er reinur og turrur við levering, tí so fæst ein reinari fletting.

Um vit fletta fyri tykkum, er møguleiki hjá tykkum at fáa krovini beinleiðis av slakti-linjuni í bilin. So slepst undan at tey krov, sum skulu í hjallin at hanga, fara í kølirúm fyrst. Annars verða krovini hongd upp á køl, sum er í mesta lagi 7 hitastig, og tá skulu tey heintast seinni sama dag, sum tey eru flett.

Vit byrja at fletta Hós 28. september og halda fram til fríggjadagin 20. Oktober.

Vinaliga

Alberg Gaardlykke
kras@ph.fo
Tlf. 23 53 60

# Prísir og treytir fyri fletting 2017

## Keyp av lombum

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Keyp av lombum | 13 kg + | 57,60 kr. Kg | u/MVG | 72,00 kr. Kg v/MVG |
| Keyp av lombum | 11-12,9 kg | 52,00 kr. kg | u/MVG | 65,00 kr. kg v/MVG |
| Keyp av lombum upp til | 10,9 kg | 40,00 kr. kg | u/MVG | 50,00 kr. kg v/MVG |

Ær og veðrar verða ikki keypt.
Tá vit keypa lombini, eigur Krás alt. Vektin er slaktivekt.

---

**Fletting upp á tænastu**

| | | |
|---|---|---|
| Meira enn 100 seyðir | 108,00 kr. stk. u/ MVG | 135,00 kr. v/ MVG |
| Millum 50-99 seyðir | 120,00 kr. stk. u/ MVG | 150,00 kr. v/ MVG |
| Milllum 20-49 seyðir | 136,00 kr. stk. u/ MVG | 170,00 kr. v/ MVG |
| Færri enn 20 seyðir | 160,00 kr. stk. u/ MVG | 200,00 kr. v/ MVG |
| Ær | 160,00 kr. stk. u/ MVG | 200,00 kr. v/ MVG |
| Veðrur | 232,00 kr. stk. u/ MVG | 290,00 kr. v/ MVG |

Tá flett verður upp á tænastu, eigur Krás skinn og tálg.

Vit eru eisini áhugað í at keypa ein part av eini gongu, meðan ein annar partur verður flettur upp á tænastu. Tá verður prísurin ásettur eftir tí samlaða talinum, sum verður leverað.

Ynskiligt er, at sagt verður frá sum skjótast, nær tit vilja hava seyðin flettan, so vit kunna leggja heystið til rættis sum best.

So vel fjalldagin longu nú og tryggja tær pláss at fáa seyðin flettan.

Um ikki viðrar, fáa hvørki vit ella tit gjørt nakað við tað, tit boða tá frá, og vit finna eina nýggja tíð.

Alberg Gaardlykke
kras@ph.fo
Tlf. 23 53 60